# Bárður Jákupsson í Galerie Focus

Fríggjadagin 29. februar kl. 16 til 18 letur ein framsýning við málningum hjá Bárður Jákupsson upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Málningalist hansara kenst av einum hugburði til litir, ið er knýttur at vøkstri og grøði í teirri sansaðu náttúruni, og fríðari og rytmiskt livandi pensilsskrift, sum - stílistiskt og grafologiskt - eyðkennir bæði listamansins mensku megi og fína musikalitet. At kalla Bárð Jákupsson abstraktan hevði verið tað sama sum at avdúkað tørvandi kunnleika til teir náttúrurunnu formar og litir, ið umgeva hann í gerandisdegnum, og sum staðiliga geva honum íblástur, sjálvt tá ið hann hevur teir ikki fyri eygunum í málara-verkstaðnum, framman fyri myndafótinum. Og at rópt hann modernist hevði verið at skúgvað til viks hansara samskifti við málningsins ástøðiligu framburðsmøguleikar.

Bárður Jákupsson er ekspressionistur eftir náttúrunnar treytum, og hann kennir sum fáur møguleikan hjá pensils-strokunum til at tala við kalligrafiskum máli, til bæði at sleppa tí gamla heiminum og avdúka ein nýggjan. Tvey sløg av náttúru møtast í listini hjá Bárði Jákupssyni: málningsins náttúra - og Føroya, og tær eru felags um at vera í sterkari rørslu og støðugari broyting.

Peter Michael Hornung úr bókini Myndlist í Føroyum, 2000.

Framsýningin verður opin til 11. februar, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og ælingur, sum fraiłður kavi, men eisini sólglottar. Hitalagið fellur niður í eini 2 kuldastig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum 2 og 4 kuldastig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og sólglottar, men kanska okkurt kavaælið. Hitalagið millum 2 og 4 kuldastig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitalagið millum frostmarkið og -4 stig.

Meðalhitin í December var 4,1stig móti 3,8 stig. Avfallið var bert 96 mm, móti 175 mm í meðal yvir 30 ár.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -9 |
| Nuuk | -5 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 7 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | |
| Aberdeen | 4 |
| London | 5 |
| Tromsø | -3 |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -5 |
| Stokkhólm | -3 |
| Keypmannah. | -3 |
| Helsinki | -10 |
| Moskva | -15 |
| Berlin | -11 |
| Warzawa | -13 |
| Kiev | -16 |
| Bukarest | -13 |
| Paris | 4 |
| Madrid | 10 |
| Róm | 10 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 6 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 1 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 12 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 32 |
| La Paz | 7 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 32 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. norðan fyri Jan Mayen fer eystureftir og dýpist. Kuldabrúgvin haðani til Íslands kemur hendavegin.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið í landnyrðing úr Jan Mayen fer eystureftir og kuldabrúgvin haðani til Føroya fer í landsynning.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 24/01 kl. 06⁰⁰ – 25/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 121 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

23. januar: Fyrra kvarter
30. januar: Mánin næstur jørðini/ fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 26. jan | 02:45 | 15:12 | 01:45 | 14:12 | 02:00 | 14:27 | 04:45 | 17:12 | 05:45 | 18:12 | 01:00 | 13:27 | 00:00 | 12:27 | 03:00 | 15:27 | 04:00 | 16:27 | 02:30 | 14:57 | 03:45 | 16:12 |
| 27. jan | 03:40 | 16:08 | 02:40 | 15:08 | 02:55 | 15:23 | 05:40 | 18:08 | 06:40 | 19:08 | 01:55 | 14:23 | 00:55 | 13:23 | 03:55 | 16:23 | 04:55 | 17:23 | 03:25 | 15:53 | 04:40 | 17:08 |
| 28. jan | 04:37 | 17:05 | 03:37 | 16:05 | 03:52 | 16:20 | 06:37 | 19:05 | 07:37 | 20:05 | 02:52 | 15:20 | 01:52 | 14:20 | 04:52 | 17:20 | 05:52 | 18:20 | 04:22 | 16:50 | 05:37 | 18:05 |
| 29. jan | 05:34 | 17:59 | 04:34 | 16:59 | 04:49 | 17:14 | 07:34 | 19:59 | 08:34 | 20:59 | 03:49 | 16:14 | 02:49 | 15:14 | 05:49 | 18:14 | 06:49 | 19:14 | 05:19 | 17:44 | 06:34 | 18:59 |
| 30. jan | 06:25 | 18:52 | 05:25 | 17:52 | 05:40 | 18:07 | 08:25 | 20:52 | 09:25 | 21:52 | 04:40 | 17:07 | 03:40 | 16:07 | 06:40 | 19:07 | 07:40 | 20:07 | 06:10 | 18:37 | 07:25 | 19:52 |